## Fáa ikki fisk at turka

Íslendska fyritøkan Samherji hevur gjørt av at gevast við at turka fisk á Hjalteyri. Tí boðaði felagið frá í gjár. Tað merkir tó ikki, at tey, sum hava arbeitt við turkingini, missa arbeiðið, tí leiðslan hevur funnið teimum annað arbeiði í fyritøkuni. Samherji hevur eitt virki í Dalvík, sum turkar høvd, og ætlanin er at turka eitt sindur av fiski har. Leiðslan dylur ikki fyri, at turkingin minkar, tí kvotuskerjingin ger tað trupult at fáa nóg nógvan tosk av turka.



## Havið sum ruskpláss

Í Kanada eru talsmenn hjá inuittunum í øðini um, at kanadisku myndugleikarnir ætla at loyva sjóverjuni at tveita ymiskt burturkast í havið, tá skipini eru á eftirlitsferð á havleiðunum norðanfyri. Ætlanin sigur millum annað, at eru skipini meiri enn 1,25 fjórðing úr landi, kunnu tey koyra matleivdir og spillvatn á sjógvin. Men inuittarnir mótmæla. Teir siga, at havið er ikki naka ruskpláss og vilja hava myndugleikarnar at taka málið uppaftur.

# Amerikanskur føroyingur í Seattle




*Eyðfinn Tausen, stjóri á Select Fish, frammanfyri virkinum í Seatlle, saman við hálvu føroyingunum, Vilmund, Allen og Kathrinu Boggs*
*Mynd: Leo Poulsen*

**Eyðfinn Tausen úr Vági hevur búð í Amerika í meiri enn 30 ár. Men hóast hann vitjar aftur heima í Føroyum á hvørjum ári, er hann rættiliga avgjørdur: Eg komi ongantíð aftur til Føroya at búgva**

ÚTISETI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Føroyingar finnur tú allastaðni, verður sagt. Og helst man nakað vera í hesum.

Tá undirritaði fyrr í mánaðinum var í USA og vitjaði var mær sagt, at ein føroyingur var búsettur í Seattle, og gjørdi tí av at heilsa upp á viðkomandi, meðan eg var har.

Talan er um Eyðfinn Tausen úr Vági, og vit gjørdu avtalu um at hittast á fiskavirkinum, har hann starvast sum annar av stjórunum.

Virkið, talan er um, nevnist Select Fish, og varð stovnað í 1987 av Scott Barber, sum byrjaði í bilskúrinum við einum pick-up lastbili.

- Í 1991 kom eg fyrstu ferð í samband við Scott og byrjaði sama ár eitt samstarv við felagið. Hetta samstarv helt fram til 1997, tá eg fór í fast starv hjá Select Fish, sigur Eyðfinn Tausen.

Í 1999 keypti hann seg so inn í felagið sum minnilutaeigari, men í dag hevur hann selt sín part aftur, og starvast tí sum vanligur stjóri.

Men gongdin hevur verið góð hesi árini, Eyðfinn hevur sitið við róðrið.

- Afturi í 1997 høvdu vit ein umsetning upp á 2,5 milliónir dollarar. Í dag liggur hann um tær 30, sigur Eyðfinn Tausen.

Hann leggur aftrat, at stóra framgongdin hjá felagnum hevur gjørt, at tað í dag eru tveir stjórar. Sjálvur tekur hann sær av framleiðslu, innkeypi, góðskustýring og líknandi, meðan ein annar nú tekur sær av sølu og marknaðarføring burturav.

### Í uttanríkistænastu

Eftir lidna skúlagongd í Føroyum fór Eyðun Tausen niður til Danmarkar á kenda Niels Brock skúlan at útbúgva seg víðari. Haðani gekk leiðin aftur til Vágs, har hann gjørdist virkisleiðari á Polarfrost.

Men skjótt dró ferðahugurin, og í 1975 fekk hann starv hjá danska uttanríkismálaráðnum, sum sendi hann vestur um hav. Har førdi starvið hann til New York, New Orleans, Los Angeles og síðani norður í kuldan í Alaska.

- Seattle er ein av heimsins størstu fiskaríhavnum, og eg fekk hug at starvast innan hendan ídnaðin aftur. So eg arbeiddi í eina tíð fyri týsku fyritøkuna Baader, sum framleiðis framleiðsluútgerð til fiskiídnaðin, sigur Eyðun Tausen.

Tað er first og fremst Alaska sum ger, at Seattle hevur so stóra fiskaríhavn, tí tað verður nógv fiskað fram við Alaskastrondini.

Her kann til stuttleika nevnast, at sjónvarpsrásin Discovery sendir eina røð, sum teir nevna The Deadliest Catch, ið snýr seg um krabbafiskarar í Beringshavinum. Hetta eru fyri allarstørsta parting skip úr Seattle, og Eyðfinn sigur, at hann persónliga kennir fleiri av monnunum, ið eru við í hesum sendingum.

Eyðvitað treivst Eyðfinn væl í tí amerikanska, og tað var eisini í Los Angeles, at hann hitti komandi konu sína. Hon var kortini ikki amerikanari, men dani og nevnist Ulla.

Fyri ein føroying var Los Angeles tó I heitara lagi, og arbeiðið sum Baader umboðsmaður gjørdi, at hann var oftani í Alaska, so tey bæði gjørdu eitt slag av semju og búsettust mitt ímillum, nevniliga í Seattle.

### Heima á hvørjum ári

Eyðfinn hevur ikki verið serliga umgyrdur av føroyingum, síðani hann fyri 32 árum síðani endaði í USA.

- Foreldrini hava einaferð verið her yviri og vitjað, og tað var í 1979, tá Ulla og eg giftust. Annars siglir yngsti bróðurin, Kaj, úti, og hann plagdi onkuntíð at koma inn í Tacoma í nakrar tímar. Hann hevur verið her nakrar ferðir, men annars hevur verið smáligt við vitjan, sigur Eyðfinn Tausen.

Men hann trívist væl sum flakavirkisstjóri í Seattle, og er vorðin ein partur av amerikanska samfelagnum. Hann tosar um baseball, amerikanskan fótbólt og basketball. Hann hevur eitt sesong-atgongumerki til Seahawks, sum er amerikanska fótbóltsfelagið í býnum – sum Microsoft stovnarin Paul Allen annars eigur.

Og virkið gongur sum nevnt væl. Teir framleiða fyri tað mesta laks og kalva á virkinum í Seattle, umframt nakað væl av toski. Hetta eru eisini størstu sølubólkarnir hjá virkinum, sum sendir um alt landið. Men eisini krabbar og meiri eksotisk fiskasløg sum tunfiskur er á vøruskránni.

Virksemið økist í veruleikanum so nógv, at teir í løtuni eru í ferð við at hyggja seg um eftir størri hølum. Í løtuni arbeiða 52 fólk á Select Fish.

Men meðan veturin gongur sína gongd í Seattle, so er Eyðfinn Tausen at finna í Føroyum á hvørjum ári um Ólavsøkutíð. Onkuntíð er konan við, onkuntíð annar av synunum, men hvørja ferð Eyðfinn sjálvur.

Ikki, at hansara otium stendur beint fyri durum, men hann er kortini avgjørdur, tá vit spyrja, um hann ætlar sær heim til Føroya at búgva, tá hann leggur frá sær sum flakavirkisstjóri í Seattle.

- Nei, til Føroya fari eg bara aftur at ferðast, slær Eyðfinn Tausen fast.